## Afrikanarar á Toftum

Í næstum koma tveir senegalesiskir spælarar til royndarvenjing hjá B68, annar miðvallarspælari og hin framherji. Hetta eru landsmenn hjá Keita og Ndende, sum hava roynst B68 sera væl, og sum báðir komu aftur á Toftir í gjár. Sambært heimasíðuna hjá Kringvarpinum kemur bara framherjin til Føroya fyrst, tí enn eru ikki øll tey neyðugu loyvini hjá hinum spælaranum komin upp á pláss.



## KÍ-kappingin aftur í ár

Hóast KÍ komandi kappingarár fyri fyrstu ferð ikki verður at síggja í fremstu føroysku fótbóltsdeildini, er sumt enn, sum tað plagar at vera. Millum annað verður KÍ aftur í ár vertur fyri árligu Klaksvíkskappingini, sum verður vikuskiftið 27. og 28. februar. Umframt KÍ, fevnir kappingin hesa ferð eisini um HB, EB/Streym og Víking. HB vann Klaksvíkskappingina í fjør.

# Pál fingið høvuðsstuðul

**– Tað er øgiliga deiligt, at eg nú kann hugsa meira um svimjingina og minni um útreiðslurnar. Hetta kann hjálpa mær at røkka málunum, eg havi sett mær fyri 2010, sigur Pál Joensen, sum leygardagin fekk P/f Leif Mohr sum nýggjan høvuðsstuðul**




Hilmar Jan Hansen

Hava Pál Joensen og fólkini kring hann stúrt eitt sindur fyri, um tað fór at bera til at leggja líka nógva orku í svimjingina í 2010, sum gjørt var í 2009, er henda stúran eftir fáum døgum horvin sum døgg fyri sól.

Fyrst kunngjørdi Ítróttarsambandið, at Pál aftur í ár fær bróðurpartin av pengunum, ið játtaðir eru á løgtingsins fíggjarlóg til úrvalsítrótt, og harvið var ein hálv millión tøk til tær ymsu kappingarnar, sum eru á skránni. Og leygardagin kom tað síðsta upp á pláss, tá Pál skrivaði undir eina avtalu við P/f Leif Mohr, sum stuðlar honum við einum rundum, sekssifraðum krónutali í 2010, umframt at hann fær ein Audi A3 at koyra í.

– Eg haldi, at tað er øgiliga flott av teimum, at teir komu til mín, tí hetta er nakað, ein ítróttarmaður hevur nokk so nógv brúk fyri, tá talan er um nógva venjing, sigur Pál Joensen, ið ásannar, at stuðulsavtalan kann hjálpa honum at fokusera enn meira á sjálva svimjingina.

– Tað er øgiliga deiligt, at eg nú kann hugsa meira um svimjingina og minni um útreiðslurnar. Hetta kann hjálpa mær at røkka málunum, eg havi sett mær fyri 2010, tí tað verður lættari at fáa tað fíggjarliga at hanga saman.

### Brúkar royndirnar

Í fjør fekk Pál 350.000 krónur frá landinum, og tað hjálpti honum væl, so hann fekk verið við til fleiri stórar kappingar uttanlands. Hæddarpunktið var World Cup-gullið í Moskva, umframt góða hálið á Oyggjaleikunum, meðan tað kanska ikki gekst so væl í HM-kappingini í Rom og EM-kappingini í Istanbul.

– Tað var eitt sindur upp og niður í fjør, og tá eg skuldi svimja væl, riggaði tað ikki ordiliga. Men eg betraði meg nógv og kom á nógv hægri stig, enn eg havi verið áðrenn, so nú vænti eg, at royndirnar fara at hjálpa mær at fáa meira burturúr í 2010, sigur Pál, sum nú fær frið og náðir at fyrireika seg.

– Eg vóni, at tey hjá P/f Leif Mohr fáa nógv burtur úr hesum eisini, og tað vil eg gera mítt til. Kanska eru ikki so góðir møguleikar til tað, tá eg eri burturi, men eg fari so at gera mítt besta, sigur ungi svimjarin í Vági.



**Pál Joensen væntar og vónar, at hann í 2010 kann brúka sínar royndir til at fáa frægari úrslit, tá tað veruliga ræður um, so sum í HM- og EM-kappingunum** Mynd: Trúgvi Dam



Leivur Holm, stjóri í P/f Leif Mohr, og Pál Joensen skrivaðu seinnapartin undir eina avtalu, ið ger fyritøkuna til høvuðsstuðul hjá svimjaranum í 2010 Mynd: Trúgvi Dam

# Løn fyri hart arbeiði

**– Pál er ein ungur ítróttarmaður við stórum og ambitiøsum ætlanum, umframt at hann er miðvísur og arbeiðir hart. Tí vildu vit gera nakað serligt burtur úr honum, nú vit fylla 75 ár í ár, sigur stjórin í P/f Leif Mohr, Leivur Holm**




Hilmar Jan Hansen

Eini hálvthundrað fólk vóru komin í hølini hjá P/f Leif Mohr leygardagin, tá fyritøkan hevði bjóðað til móttøku, tí ætlanin var at heiðra einum av okkara fremstu ítróttarfólkum. Mong høvdu óivað gitt tað, men tá Pál Joensen sást mitt í mannamúgvuni, ivaðist eingin longur í, hvør var høvuðspersónur hesa seinnapartsløtuna á Hoyvíksvegi 53.

Stjórin í P/f Leif Mohr, Leivur Holm, var heldur ikki í iva, tá hann fekk orðið og greiddi frá, hví valt var at gera serliga nógv burtur úr júst Páli í ár, nú fyritøkan í ár fyllir 75 ár.

– Vit vildu markera hetta árið við nøkrum serligum, og av tí at Pál er ein ungur ítróttarmaður við stórum og ambitiøsum ætlanum, umframt at hann er miðvísur og arbeiðir hart, fall valið á hann. Vit vilja royna at hjálpa honum at taka tey allarsíðstu fetini heilt upp á tindarnar, segði Leivur Holm.

– Pál er ein stór fyrimynd fyri føroyskan ungdóm og føroysk ítróttarfólk, og sum støðan er í løtuni, er eisini brúk fyri fyrimyndum.

Stjórin í P/f Leif Mohr ásannar eisini, at tankin um tað, sum fyritøkan og Pál hava til felags, eisini telur sítt. Hann sigur, at hóast fyritøkan er gomul, er hon ung í sinni, og vil við hesum eisini vísa, at hon arbeiðir við miðvísum ætlanum fyri framtíðina.

– At vit nú hava valt at stuðla Páli, er eitt eyka átak í ár, tí hetta er eitt serligt ár hjá okkum. Vit hava altíð roynt at stuðlað ítróttinum, og hetta merkir ikki, at einki verður til nakað annað. Hinvegin kundi tað væl hent seg, at vit fara at halda fram við samstarvinum við Pál, tá hetta árið er farið – serliga, um tað fer at gangast honum øgiliga væl, sigur Leivur Holm.